# r sum hindu



*- Eg ivist ikki í, at tað var mín lagna at fáa ábyrgdina av fýra børnum í India, so eg kundi vera nakað fyri onnur, sigur Eivindur í Gongini*

hevði hann langt síðani gloymt alt um, men eitt ár seinni fór hann aftur til Danmarkar at gera sína útbúgving í listapedagogikki lidna. Hann vildi fegin brúka sína útbúgving í India, har hann sá, at tørvur var á slíkum. Í dag heldur hann skeiðir fyri ungfólki í at mála og tekna í umráðnum, har hann býr nú, eftir at hann flutti frá sínum indisku børnum.

- Eg flutti, tá tann elsti sonurnin giftist, tí eftir hindu siðvenju skal elsti sonurin taka sær av teimum eldru í familjuni, eftir at hann er giftur. Ta ábyrgdina vildi eg ikki leggja á hann, tí eg eri frískur og ongum nýtist at kenna sær ábyrgd av mær. So eg keypti mær eini hús úti við strondina, har eg búgvi nú.

## Altíð Gud við

Tá Eivindur flutti til India, valdi hann eisini at liva í tráð við hinduistiskan livihátt. Hetta merkir tó ikki, at hann avnoktar sína kristnu trúgv. Hana hevur hann altíð við sær, har hann fer, og hann biður framvegis faðirvár.

- Hinduisman er ikki ein trúgv, tú kanst konvertera til ella smoyggja av tær. Antin ert tú føddur sum hindu, ella ert tú ikki, men tú kanst taka teirra livihátt til tín, og tað havi eg valt at gera. Tann hinduistiska og mín fatan av trúgv er, at tú tekur tað, tú kanst brúka, til tín og letur restina liggja eftir, sigur Eivindur og leggur afturat, at verulig trúgv er individuell og ikki eitt liðugt sett av reglum, tú kanst smoyggja yvir høvdið á fólki. Hugurin og trongdin at trúgva má koma innan úr menniskjan-um sjálvum.

- Tað er kanska trupulleikin í Føroyum. Her tykist trúgv í stóran mun at vera ein máti, øll mugu bera seg at uppá, tí tað stendur í Bíblinuni. Tí síggja vit eisini øll hesi lesararbrøvini, har fólk brúka Bíbliuna til at sláa onnur í høvdið við. Hinduar trúgva hinvegin, at Gud býr inni í okkum sjálvum, og at øll menniskju innast inni ynskja at hjálpa øðrum menniskjum. Tí skilja tey eisini í stóran mun heilagu skriftina sum eina vegleiðing í, hvussu vit kunnu vera nakað fyri onnur, so vit fáa eitt betri lív.

Sum hindu livir Eivindur eitt lív, har Gud er við allatíðina og allastaðni. Templið er altíð opið, um hann hevur brúk fyri tí, og sjálvur mediterar hann tríggjar tímar hvønn dag fyri at koma tættari at Gudi. Fyri hann er trúgvin ikki nakað, tú tekur fram til serlig høvi ella millum 11 og 12 sunnumorgun. Hendan munin merkir hann væl í Føroyum, men eisini har hann býr.

- Beint við, har sum eg búgvi, liggur ein katólsk kirkja. Tá katolikkarnir ganga framvið hjá mær á veg til messu, hava tey hug at fílast á, at eg kanska standi og gravi í havanum og biða meg heldur koma við sær. Eg havi onki ímóti katolikkum, men eg dugi ikki at síggja, hví eg skal fara til messu, tá eg havi Gud við í hjartanum, meðan eg gravi í havanum.

## Lívið og rukkutu klæðini

- Eg havi funni frið við meg sjálvan, tí eg veit, at svarini uppá mínar spurningar til lívið finnast inni í mær sjálvum, sjálvt um vegirnir til tey eru ymiskir. Allir mínir málingar ímynda hesa áhaldandi leitan, sum vegir, ið onkuntíð eru smalir, aðrar tíðir breiðir, krókutur ella onkuntíð steðga og byrja aftur eina heilt aðrastaðni. Soleiðis er lívið, fløkt at síggja til, men kortini so ótrúliga einfalt, tí svarið liggur altíð beint fyri nøsina á tær, sigur Eivindur og leggur afturat, at orsøkin til, at Vesturlendigar oftast fata lívið sum eina stóra fløkju, er tí teir leita altíð eftir svarinum onkra aðrastaðni, enn har tað er at finna.

- Fólk undrast altíð yvir, hví hesi indisku klæðini, hinduar ganga í, altíð eru so rukkut. Tað man væl ikki vera, tí tey sova í teimum?, gruna tey og gera so í staðin av, at tað má hava okkurt við tilfarið og vevingina at gera.

- Men nei, klæðini vit ganga í, eru so rukkut, tí vit sova í teimum. So einfalt er tað, og so einfalt er lívið, sigur Eivindur smílandi.